# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*Hví skrivar tú ikki sjálvur eina lærubók í veðurlæru á føroyskum?!*

*Hanus Kjølbro við nýggju bók síni "Veðurlæra". Hon er ætlað bæði næmingum á Vinnuháskúlanum og øðrum, sum hava áhuga í veðrinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Bók um veðrið útkomin

**Veðrið hevur altíð havt stóran týdning fyri føroyingin. Tann stóri spurningurin hevur tó altíð verið, hvussu tað tíggjaði sær. Tað hevur Hanus Kjølbro á Viðareiði nú gjørt sítt til at lýsa við nýggju bókini "Veðurlæra". - Eg helt tað vera neyðugt, at vit hava føroyskt tilfar til undirvísingina í veðurlæru, sigur nýggi rithøvundurin**

VEÐRIÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Viðareiði:** - Bara tað, at nú kemur ein bók á føroyskum í einum so týdningarmiklum faki sum veðurlæra, er í sjálvum sær ein stórhending, sigur Ólavur á Heygum, fyrrverandi sjómansskúlalærari um nýggju bókina hjá Hanusi Kjølbro.

Dagliga arbeiðir Hanus á Sjóvinnudeplinum í Havn, umframt at hann hevur siglt úti og hevur verið lærari á sjómansskúlanum í Klaksvík í fleiri ár, millum annað í veðurlæru.

Sum tilfar til undirvísingina í veðurlæru bað hann tá teir komandi skipararnar um keypa eina tjúkka danska bók.

Henda bókin var í roynd og veru ov stór til tað, sum teir skuldu læra. Tí var neyðugt hjá lærara og næmingum at pilka rættiliga fitt burtur úr bókini.

- Hetta órógvaði sum vera man undirvísingina. Og so kom tankin til mín: Hví skrivar tú ikki sjálvur eina lærubók í veðurlæru á føroyskum?!, hugsaði Hanus.

Sum sagt so gjørt. Tað tók sína tíð frá hugsan til veruleika, men nú er bókin útkomin. Hóskvøldið verður móttøka á Klaksvíkar Sjómansskúla kl. 19, tá bókin verður løgd fram.

- Eg skilji nú, hvat ið krevst fyri at geva út eina bók, staðfestir Hanus fyri Sosialinum.

### Hentur orðalisti

Hanus Kjølbro er sjálvur sera áhugaður í veðrinum, og hetta roynir hann eisini at fáa teir komandi skipararnar at gera.

At hetta veruliga hevur eydnast honum, bera orðini hjá einum av sjómansskúlanæmingum hansara besta prógvið um.

- Bókin er skrivað á ein sera væl skiljandi hátt. Hon er góð og áhugaverd – ja, ein fongur fyri føroyingin, sigur Andras Samson, næmingur.

Nýggja bókin, sum stutt og greitt kallast "Veðurlæra" er ætlað at verða nýtt í undirvísingini, men hetta er eisini ein sera hent bók til onnur, sum hava áhuga í veðurfrøði.

Rithøvundurin staðfestir, at tey seinastu 100 árini eru gjørd stór framstig í veðurfrøði, ikki minst hava fylgisveinar gjørt sítt til tað.

Í bókini roynir Hanus tí at greiða frá ymiskum veðurfrøðiligum fyribrigdum, og við løttum máli verður sagt frá, hví veðrið tíggjar sær soleiðis sum tað nú einaferð ger.

Hanus hevur gjørt sær rættiliga stóran ómak við bókini alla tíðina, meðan hon so við og við er vorðin veruleiki.

- Eg havi brúkt alt tilfarið í undirvísingini, og her havi eg fingið viðmerkingar og hent ráð, bæði frá næmingum og frá lærarum.

- Soleiðis havi eg justerað alt til tað úrslitið, sum henda bókin so líðandi er vorðin til, slær Hanus fast.

Bókin er eitt rættiliga nýbrot, tí aftast í bókini er ein listi við orðum, sum ofta koma fyri, tá tosað verður um veðurfrøðilig viðurskifti.

Bókin Veðurlæra er útgivin av forlagnum Silvitni, hevur 180 síður og kostar 348 krónur.



RØRSMIÐJUR
Vit sóknast eftir einum rørsmiði

**Tín førleiki**
Vit vóna, at tú ert dugnaligur, íðin, nærlagdur og sjálvstøðugur. Harafturat skalt tú skilja týdningin av góðum handverki.

**Afturfyri bjóða vit**
Tú fært góðar arbeiðsumstøður og eitt mennandi fakligt arbeiðsumhvørvið.
Stutt sagt – eitt starv í einari spennandi og fjøltáttari fyritøku í støðugari menning.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum er mánadagin, 17. desember.

Um tú hevur spurningar, ert tú vælkomin at ringja til okkara á tel. 312 000.

Maria Poulsen pf
Postmoga 182
FO-110 Tórshavn

Maria Poulsen

hvonn.fo

GLØGG & HOLUKØKUR
kr.60,-

Opið hvønn dag kl. 12-24
Frí & ley til kl. 02.00





hvonn
BRASSERIE

Tórsgøta 4
100 Tórshavn
Tel 350035
hvonn@hvonn.fo
www.hvonn.fo